# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Monu Haraldsen** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum hósdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju fríggjadagin klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Monu, kunnu lata Føroya Blindafelag eina gávu.

Týsdagin 11. november andaðist **Jens Reynhold Olsen av Toftum**, 64 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin klokkan 16. Kistan kemur í Fríðrikskirkjuni umleið klokkan 18. Jarðarferðin verður leygardagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Jens Reynhold, kunnu lata Fríðrikskirkjuni eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Úlfur Hjörvar** andaðist í heiminum í Keypmannahavn 9. november, 73 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Dómkirkjuni í Reykjavík fríggjadagin 21. november kl. 15.

Sigga **Maria Rasmussen, Hornslet, Danmark**, fødd Jacobsen, Uppsalar, Klaksvík, andaðist mánadagin, 69 ára gomul.

# Gissur Patursson coachútbúgving



Gissur Patursson í Havn hevur lokið fylgjandi próvtøkur á MANNING INSPIRE sm skúlanum í seinastu viku: Coachútbúgving við tilhoyrandi trening í teori & praksis og er útbúgvin í kynstrinum at Coacha, útbúgving & prógvtøku við sergrein i LIFE COACHING, og útbúgving & prógvtøku við sergrein í BUSINESS COACHING.

Allar tríggjar próvtøkurnar eru loknar við „rós" á skúlanum MANNING INSPIRE sm.

Útbúgvingin er I C F góðkend (International Coach Federation).

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara høgt elskaði beiggi

**Jens Reynold Olsen**

andaðist á Landssjúkrahúsinum 11. november, 64 ára gamal
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 16.
Jarðarferðin verður leygardagin kl. 14 úr Fríðrikskirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Syskini**

Tey, ið vilja minnast Jens Reynold, kunnu lata eina gávu til Fríðrikskirkjuna, konto í peningastovnunum

# Sixt skrivstovu í Føroyum

Ein av heimsins størstu bilaleigufyritøkum kemur nú til Føroyar. Talan er um donsku deildina av altjóða Sixt felagsskapinum, sum letur bilaleiguskrivstovur upp á flogvøllinum í Vágum og í Tórshavn.

Sambært Sixt hevur fyritøkan longu nógv føroysk viðskiftafólk, ið brúka Sixt bilaleigu í samband vid frítíðar- og handilsferðir bæði í Danmark eins og øðrum londum. "Hesi viðskiftafólk vilja vit ógvuliga fegin kunna tæna í Føroyum eisini, og harumframt kenna vit okkum í Sixt sera tætt knýtt at teimum norðuratlantisku oyggjunum bæði handilsliga og persónliga", sigur stórin í Sixt Kasper Gjedsted.




*Kasper Gjedsted er stóri í bilaleigufyritøkuni Sixt, sum letur bilaleiguskrivstovur upp á flogvøllinum í Vágunum og í Havn*

Danski stjórin í Sixt hevur sjálvur ein sera stóran kærleika til Føroyar og til eina gentu úr Suðuroy.

"Eg forelskaði meg í Føroyum fyrstu ferð eg vitjadi landið", sigur tann danski stjórin Kasper Gjedsted. "Tað sum bergtók meg, fyrstu ferð eg var her, vóru tær vakru oyggjarnar og tað fantastiska gestablíðni, ið eg møtti. Og nøkur ár seinni bleiv eg faktisk forelskaður enn einaferð – hesaferð í einari føroyskari gentu, sum eg møtti undir einum av mínum handilsferðum fyri Maersk", fortelur stjórin og heldur fram: "Tað er tí eyka deiligt at fáa loyvi til at verða við til at lata upp Sixt bilaleiguskrivstovur her í Føroyum – og tað er eisini sera deiligt at taka ímóti so nógvum føroyskum viðskiftafólki á okkara skrivstovum í Danmark og øðrum Sixt londum".

### Um Sixt

Sixt vil markera upplatingina av skrivstovunum í Føroyum við at boða tíðindini í nógvum ymsum fjølmiðlum, sum felagið hevur samband við. Tíðindaskrivini sum javnan verða send út, hava fleiri milliónir av lesarum í millum annað Týsklandi, Danmark, Sweis og Frankaríki. Hetta vil seta fokus á Føroyar, og vónandi verða við til at geva íblástur til enn fleiri frítíðar- og handilsferðandi at vitja oyggjarnar.

Sixt er eitt av heimsins størstu feløgum innan bilaleigu, leasing, bilarøkt, limousinutænastu og bilasølu. Sixt hevur skrivstovur í meira enn 90 londum, umsetti í 2007 fyri umleið 13 milliardir danskar krónur og er skrásett á tí týsku fonsbørsini. Sixt er útnevnt sum besta bilaleigufyritøka í Europa og er nýggi bilasamstarvsfelagin hjá SAS í samband vid SAS Eurobonus skipanini. Les meira um Sixt á www.sixt.dk.

**Dagurin**
**13. november. Arcadius**, deyður ár 437. Aðalborðin maður, sum var í fylginum hjá vandalakonginum Geiserik. Tá ið tað kom upp, at hann var kristin, varð hann tikin av døgum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo